

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 10 - 2011

# Oljuvinnan fer við verkfrøðingunum

Í Noregi hava bæði tað almenna og kommunurnar ilt við at fáa fatur á nóg nógvum verkfrøðingum, tí teir vilja heldur arbeiða í oljuvinnuni, har lønarlagið er væl hægri. Kommunurnar kæra seg um, at nógvar kommunalar verkætlanir verða ikki settar í verk so skjótt sum ætlað, og harafturat verður arbeiðið ikki fullført so væl sum ætlað. Almennir stovnar so sum Vatn- og Orkustýrið NVE og Petroleumseftirlitið kæra seg eisini um, at tey kunnu ikki kappast við tey privatu feløgini um lønina. Eisini aðrastaðni innan tað almenna er trot á ymsum frøðingum. Eitt nú eru ov fáir jarðfrøðingar til at kanna vandan fyri omanlopum og ov fáir hydrologar til at kanna, hvat kann fáast burtur úr vatni. Í norska verkfrøðinga- og teknologfelagnum hava tey staðfest gongdina. Felagið sigur, at næstan helmingurin av kommununum hava eitt ella fleiri ósett verkfrøðingastørv, og at tað er óheppið fyri raðfesting, nýbygging, viðlíkahald og annað. Einasta loysn er sambært felagnum at útbúgva fleiri fólk við tí neyðuga teknologiska førleikanum.